## TB omaná í grannauppgerð

TB skal leygardagin spæla móti føroyameistarunum úr B36. Tað gjørdist greitt, tá TB í fyrsta umfari í kappingini um Løgmanssteypið leygardag vann 3-1 á heimavølli móti grannunum í Royn.

Fyrra umfarið var málleyst. Eftir steðgin skoraðu Kaj Roest, Allan Poulsen og Búi Mortensen fyri TB, og Jens Kristian Joensen pyntaði um fyri hvalbingar.

Dysturin millum B36 og TB verður í Gundadali

**-mørk**

## SÍ fær vitjan av NSÍ

Tað er ikki á hvørjum ári, at feløg í Formula-deildini vitja í Sørvági. Soleiðis verður tað í ár. Leygardagin fer NSÍ at spæla á útivølli í Sørvági.

Hetta gjørdist greitt leygardagin, tá ið SÍ í fyrsta umfari í kappingini um Løgmanssteypið vann 1-0 á heimavølli móti MB.

Einsamalla málið varð skorað, tá ið seinna umfarið var stórt korter gamalt. Málskjútti var Bogi Selfoss.

**-mørk**

## Fram skal til Klaksvíkar

Afutr í ár skal Fram spæla móti KÍ í kappingini um Løgmanssteypið. Fram spældi leygardagin móti NÍF, og hendan dystin vann havnarliðið 4-1.

1. hálvleiki skoraði Terji Nielsen einsamalla málið fyri Fram. Eftir steðgin javnaði Ian Jacobsen, áðrenn Fram skoraði trý mál afturat. Málskjúttar vóru Áki Mortensen, Terji Nielsen og Sunleif Jacobsen.

Fram fer at vitja KÍ leygardagin í næstu viku.

**-mørk**

## AB heldur fram

FS Vágar04 er longu sent úr kappingini um Løgmanssteypið, og argjamenn fara at halda fram.

AB vitjaði á leygardagin Valloyrini í Sandavági, og Rúni Nolsøe og hansara menn fóru til hús við 2-1 sigri. Allan Mørkøre setti hol á við frísparksmáli 74. minutti. Elfinn Ørvarodd javnaði í 78. minutti eftir deyðbólt í høgru, men í 89. minutti skoraði Jón Brekku sigursmálið eftir innlegg úr høgru og til handara stólpa.

AB skal í 2. umfari, sum verður leygardagin, spæla á Skála.

**-mørk**

# Føroyingarnir fingu fulla spælitíð

**Bæði Jón Rói Jakobsen og Súni Olsen vóru við allar níti minuttirnar, tá Aab á útivølli ímóti SønderjyskE bjargaði sær javnleik í evstu løtu**

FÓTBÓLTUR

*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*

Eftir at teir báðir landsliðsleikararnir sótu á bonkinum síðsta vikuskiftið ímóti Horsens, høvdu teir hesuferð fingið dystarboð frá venjaranum Erik Hamrén. Jón Rói var á høgra bakki frá byrjan, og Súni spældi á vinstra bakki. Miðskeiðis í fyrra hálvleiki varð venjarin noyddur at gera nakrar broytingar, og tað hevði við sær, at Jón Rói fór í miðverjuna, og Súni flutti yvir á høgra bakk.

Ikki kann sigast, at Aab fekk nakra serliga góða byrjan, tí longu eftir tíggju minuttir legði Peter Sand SønderjyskE framum. Eftir ein hálvan tíma gjørdist ilt verri hjá Aab, tí tá skoraði Simon A. Pedersen til 2-0.

Eftir steðgin ressaðist Aab nakað, og miðskeiðis í seinna hálvleiki minkaði Caca til 2-1. Aab legði síðani stórt trýst á SønderjyskE, men ikki fyrr enn í 94. minutti fekk Aab útjavnandi málið, tá ein av suðurjydunum var so óheppin at beina bóltin í egið mál.

Aab liggur á fimta plássi við 29 stigum fyri 22 dystir. Eitt lítið lop er upp til Viborg á fjórða plássi, sum hevur átta stig fleiri.



*Saman við Jón Róa Jacobsen var Súni Olsen á vøllinum í samfullar 90 minuttir, tá AaB í evstu løtu fekk bjargað sær stig móti botnproppinum í donsku superliguni*

# Liðfelagar hjá Toda fóru til hendurs

**Fyrsta venjingin hjá Start á venjingarlegu í Marbella endaði við, at tveir av spælarunum hjá Start fóru til hendurs. Liðfelagar máttu leggja upp í fyri skilja partarnar at**

FÓTBÓLTUR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað var ein lítil løta eftir av fyrstu venjingini hjá Start í Marbella, tá ið tveir av spælarunum brustu saman.

Eftir ein harðan nærdyst fóru Bård Borgersen og Lunde Aarsheim til hendurs, og nevarnir vóru á lofti.

Blaðið Fedrelandsvennen skrivar, at rokið var so ógvuligt, at einir 10 liðfelagar hjá teimum báðum máttu til fyri at skilja teir at.

– Tað er keðiligt, tá ið vaksin fólk fara at verjast. Tað má bera til at spæla hart, uttan at slíkt hendir, sigur spælarin Marius Johnsen við Fedrelandsvennen.

Hendingin hevði við sær, at venjarin Tom Nordlie steðgaði venjingini og tosaði álvarsamt við spælararnar.

### Venjarin stúrir ikki

Rokið var bert ein av fleiri hendingum undir venjingini, har spælarar hjá Start vóru illir inn á hvønn annan.

Fedrelandsvennen greiðir frá, at spælararnir fleiri ferðir skeldaðust ógvusliga undir venjingini. Venjarin heldur, at hetta nýtist ikki at vera so keðiligt fyri liðið.

– Tað er munur á aggressiviteti og misskiltum aggressiviteti, men hetta er ikki tað ringasta, sum eg havi upplivað í felagnum. Tað er gott, at spælararnir eru tendraðir, sigur Tom Nordlie.

### Alt kom uppá pláss

Annar av høvuðspersónunum í bardaganum heldur, at rokið fer ikki at skapa trupulleikar á liðnum.

– Hetta vísir bara ein stóran vinnaravilja. Eg haldi, at tað skal vera lív í, og hetta mugu vit tola, segði Bård Borgersen eftir venjingina. Eisini hin høvuðspersónurin gjørdi lítið hóvasták burtur úr eftir venjingina.

– Hatta er slíkt, sum kann henda, men vit eru góðir vinir aftur. Vit skulu koyra á hvønn annan, men tað er sjálvan óheppið, tá ið vit fara ov langt, segði Lundr Aarsheim við Fedrelandsvennen.

# Metstór luttøka

Leygardagin varð dystast í FM í boccia. Hjá menningartarnaðum setti luttøkan hesa ferð met við ikki færri enn 42 luttakarum. Hesin bólkur spældi fyrst innleiðandi bólkaspæl, síðan fóru bólkarnir við rørslutarnaðum vaksnum og børnum undir sínar innleiðandi dystir.

Hjá rørslu- og menningartarnaðum var talan um einstaklingakapping. Eftir hesa fóru pensionistarnir undir sína kapping, ið varð skipað sum liðkapping.

**Úrslitini vóru hesi Menningartarnað**
1 Jan Lindberg
2 Elvin Weihe
3 Theodor Esmar Hansen

**Rørslutarnað vaksin**
1 Jói Ziska
2 Marius Johansen
3 Jonhardt Brøðraberg

**Børn:**
1 Junior Tomlinson
2 Dánjal Jákup Djurhuus
3 Heðin Midjord

**Systkin spældu eisini eina kapping, og hesi vóru úrslitini:**
1 Johan Petersen
2 Heðin Arni Johansen
3 Hjørtur Emil Johansen

**Pensionistar -**
**1 Havnin A**
Tey vóru Jenny Danielsen, Karl Simonsen og Alma Poulsen
**2 Havnin B**
Karin Johansen, Marita Thorsteinson og Jógvan Egholm
**3 Fløvi 3**
Rosa Petersen, Jytta Eliasen og Petur Knudsen

## Úrslit

| | |
|---|---|
| Danska superligan | |
| Silkeborg-Brøndby | 2-0 |
| FCM-aGF | 2-0 |
| AC Horsens-Viborg | 3-1 |
| OB-Esbjerg | 1-0 |
| SønderjyskE-AaB | 2-2 |
| FCK-FCN | 3-3 |
| Enska Premier League | |
| Everton-Aston Villa | 4-1 |
| Arsenal-Charlton | 3-0 |
| Blackburn-Middlesbr. | 3-2 |
| Bolton-Sunderland | 2-0 |
| Manchester City-Wigan | 0-1 |
| WBA-Manchester Utd. | 1-2 |
| West Ham-Portsmouth | 2-4 |
| Birmingham-Tottenham | 0-2 |
| Newcastle-Liverpool | 1-3 |
| Fulham-Chelsea | 1-0 |